gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Ólavsøkuróðurin skal bjarga kappingarárinum

**Í Hvalvík varð undirstrikað, at tað sær svart út hjá hinum bátunum at taka Havnarbátin á tvey túsund metrum**

KAPPRÓÐUR
*Jóanes Hansen*



**10–mannafør:** Havnarbáturin stevnir miðvíst fram ímóti FM heitinum, sum hann ikki hevur vunnið síðani í 1996. Í Hvalvík vunnu havnarmenn fyri fjórðu ferð av fýra møguligum. Teir vóru eina bátslongd undan Vestmenninginum, og sum róðurin myndaðist á sundalangsstevnuni, er tað torført at ímynda sær, at nakar av hinum bátunum skal gera nakað við Havnarbátin, tá vestanstevnuróðurin verður á skránni í Sørvági komandi leygardag.

Um nakar skal skala komandi FM vinnaranum, so verður tað á ólavsøku. Havnarbáturin hevur víst seg at hava mestu orkuna og størstu motivatiónina á 2000 metra teininum. Hvussu teir fara at leggja tað til rættis á styttra teininum er sjálvandi óvist, men starturin í Hvalvík vísti, sum á fleiri av hinum stevnunum, at Eysturoyingurin megnaði at vera væl við teir fyrstu sjey hundrað metrarnar.

Vestmenningar plaga ofta at koma vánaliga frá startinum, men soleiðis var tað ikki hesa ferð. Vestmenningurin sprakk avstað, og inntil bátarnir vóru komnir eitt sindur inn um 1500 metra málið, var Vestmenningurin fremstur.

So var tað, at Havnarbáturin so at siga hevði funnið stevið. Í hvørjum taki vunnu teir seg fram á og síðani framvið hinum báðu bátunum, sum høvdu bjóðað av í kappingini um fremsta plássið, og á seinna partinum av róðrinum broyttist myndin lítið og einki. Havnarbáturin var eina bátslongd frammanfyri, og tað megnaðu hinir einki at gera við.

Á málinum var gott og væl leyst frá Vestmenninginum og aftur til Eysturoyingin. Nólsoyingurin var eina bátslongd aftanfyri gula bátin, meðan Skálabáturin, sum fekk gult kort fyri í fyrstu atløgu at starta, áðrenn skotið gelti, var tvær bátslongdir aftanfyri Nólsoyingin. Ettir at teir í fjør høvdu eitt hvíldarár, hevur tað í ár avgjørt ikki gingið soleiðis, sum teir á Skálabátinum høvdu ætlað.

Men á ólavsøku verður teinurin bara knappar eitt túsund metrar. Tá verður møguleiki hjá øllum hinum manningunum at bjóða Havnarbátinum av. At tær fara at hava nakran møguleika í Sørvági tykist veruleikafjart at rokna við.

## Úrslit av kapproðróðrinum á Sundalagsstevnu

### 5-mannafør, dreingir

| | |
|---|---|
| Tjaldrið | 04.57.19 |
| Blikur | 04.59.03 |
| Sílið | 05.03.12 |
| Fípan Fagra | 05.05.05 |
| Frúgvin | 05.06.03 |
| Havfrúgvin | 05.08.23 |
| Drekin | 05.10.23 |
| Erla Kongsd. | 05.20.06 |
| Beinta | 05.28.06 |

### 5-mannafør, gentur

| | |
|---|---|
| Fípan Fagra | 05.14.16 |
| Blikur | 05.15.22 |
| Sílið | 05.19.03 |
| Tjaldrið | 05.20.10 |
| Ørnin | 05.26.20 |
| Havfrúgvin | 05.28.24 |
| Firvaldur | 05.29.15 |
| Frúgvin | 05.31.06 |
| Hvassi | 05.32.02 |
| Drekin | 05.32.22 |
| Báran | 05.38.18 |
| Dúgvan | 05.40.23 |
| Beinta | 05.42.01 |
| Snípan | 05.53.04 |

### 6-mannafør, kvinnur

| | |
|---|---|
| Páll Fangi | 05.06.00 |
| Jarnbardur | 05.09.01 |
| Sølmundur | 05.13.06 |
| Gongurólvur | 05.13.22 |
| Hvessingur | 05.18.00 |
| Leirvíkingur | 05.18.15 |
| Fortuna | 05.19.07 |
| Snopprikkur | 05.24.23 |
| Víkingur | 05.25.01 |
| Lómur | 05.28.15 |

### 6-mannafør, menn

| | |
|---|---|
| Strálan | 07.17.09 |
| Sølmundur | 07.19.27 |
| Riddarin | 07.20.09 |
| Hvessingur | 07.26.01 |
| Páll Fangi | 07.26.22 |
| Gongurólvur | 07.33.11 |
| Snopprikkur | 07.35.11 |
| Fortuna | 07.39.19 |
| Kollfirðingur | 07.48.15 |
| Lómur | 07.55.10 |
| Fuglfirðingur | 07.56.01 |

### 8-mannafør

| | |
|---|---|
| Nevið Reyða | 07.06.02 |
| Kvívíkingur | 07.09.07 |
| Knørrur | 07.09.12 |
| Argjabáturin | 07.11.08 |
| Ørvur | 07.21.15 |
| Heiðabáturin | 07.29.13 |

### 10-mannafør

| | |
|---|---|
| Havnarbáturin | 09.03.15 |
| Vestmeningur | 09.06.09 |
| Eysturoyingur | 09.11.10 |
| Nólsoyingur | 09.14.22 |
| Skálabáturin | 09.20.06 |
| Suðuroyingur | 09.46.22 |

## Støðan

### 5-mannafør, dreingir

| | Róðrar | Kort | Stig |
|---|---|---|---|
| Tjaldrið | 4 | | 26 |
| Sílið | 4 | | 17 |
| Blikur | 4 | | 17 |
| Fípan Fagra | 4 | | 12 |
| Frúgvin | 4 | | 11 |
| Havfrúgvin | 4 | | 5 |
| Erla Kongsdóttir | 4 | | 0 |
| Drekin | 4 | | 0 |
| Beinta | 4 | | 0 |
| Firvaldur | 2 | | 0 |

### 5-mannafør, gentur

| | Róðrar | Kort | Stig |
|---|---|---|---|
| Fípan Fagra | 4 | | 28 |
| Sílið | 4 | | 19 |
| Blikur | 4 | | 17 |
| Tjaldrið | 4 | | 12 |
| Ørnin | 4 | | 6 |
| Hvassi | 4 | | 2 |
| Frúgvin | 4 | | 1 |
| Havfrúgvin | 4 | | 1 |
| Firvaldur | 4 | | 0 |
| Beinta | 4 | | 0 |
| Dúgvan | 4 | | 0 |
| Snípan | 4 | | 0 |
| Báran | 4 | | 0 |

### 6-mannafør, kvinnur

| | Róðrar | Kort | Stig |
|---|---|---|---|
| Páll Fangi | 4 | | 28 |
| Sølmundur | 4 | | 18 |
| Jarnbardur | 4 | | 17 |
| Gongurólvur | 4 | | 8 |
| Víkingur | 4 | | 7 |
| Leirvíkingur | 4 | | 6 |
| Hvessingur | 4 | | 3 |
| Fortuna | 4 | | 1 |
| Lómur | 4 | | 0 |
| Snopprikkur | 3 | | 0 |

### 6-mannafør, menn

| | Róðrar | Kort | Stig |
|---|---|---|---|
| Strálan | 4 | 1G | 26 |
| Sølmundur | 4 | | 21 |
| Riddarin | 4 | | 17 |
| Hvessingur | 4 | | 12 |
| Snopprikkur | 4 | | 4 |
| Páll Fangi | 4 | | 4 |
| Fortuna | 4 | | 2 |
| Gongurólvur | 4 | | 2 |
| Fuglfirðingur | 4 | | 0 |
| Kollfirðingur | 4 | | 0 |
| Hósvíkingur | 3 | | 0 |
| Lómur | 4 | 1G | 0 |
| Víkingur | 3 | | 0 |

### 8-mannafør

| | Róðrar | Kort | Stig |
|---|---|---|---|
| Nevið Reyða | 4 | | 26 |
| Kvívíkingur | 4 | | 20 |
| Knørrur | 4 | | 17 |
| Argjabáturin | 4 | | 13 |
| Ørvur | 4 | | 5 |
| Ormurin Langi | 2 | | 4 |
| Heiðabáturin | 2 | | 3 |

### 10-mannafør

| | Róðrar | Kort | Stig |
|---|---|---|---|
| Havnarbáturin | 4 | 1G | 28 |
| Vestmenningur | 4 | | 18 |
| Eysturoyingur | 4 | 1G | 17 |
| Nólsoyingur | 4 | | 12 |
| Skálabáturin | 4 | 1G | 9 |
| Suðuroyingur | 4 | | 3 |
| Vágbingur | 1 | | 0 |

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# VB missir ofta á stokkinum



*Sum vit søgdu í blaðnum leygardagin, so er tað greitt, at Popczynski er so mikið skaddur, at hann ikki verður førur fyri at spæla í Europa Cup*

**FM vinnararnir hava ikki havt marginalirnar við sær í landskappingini. Í kvøld vóna teir, at viljin, sum í fjør var so sjónskur, rættuliga fer at síggjast**

Í kvøld skal VB fyri fyrstu ferð royna seg í Europa Cup. Vágbingar spældu í Intertoto Cup í 1998. Tá varð heimadysturin spældur í Hvalba. Mótstøðuliðið var FC Boby úr Brno í Kekkia. Í Hvalba vann kekkiska liðið 3–0, og í Kekkia var úrslitið 3–1. Einasta altjóða málið hjá vágbingum higartil skoraði Birgir Jørgensen. Sekstan minuttir vóru eftir, tá hann pyntaði um.

Í kvøld fara vágbingar at spæla á Tórsvølli. Teir hava ikki verið suðuri í Vági aftur, síðani teir taptu 3–2 í Miðvági. Sunnumorgunin vandu teir á Tórsvølli, og tað skuldu teir gera aftur í gjárkvøldið. Síðani seinnapartin sunnudagin hava teir hildið til á Svangaskarði. Uttan mun til hvussu tað fer at laga seg á vøllinum, so vita vágbingar, at teir fara at fáa eina stóra millión frá UEFA afturfyri luttøkuna í undankappingini til meistarakappingina.

### Nógvar útskiftingar

Hóast tað bara eru trý ár síðani, at VB var við í Intertoto Cup, so er tað merkisvert, hvussu nógv liðið hjá teimum er broytt síðani tá. Í Hvalba leygardagin 20. juni í 1998 sá VB liðið soleiðis út: Bjarni Johansen – Hans Pauli Dahl, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen, Jón Pauli Olsen – Magni Magnussen, Milan Kulic, Jón Gærdbo, John Eystberg – Milan Milanovic (Sigmund Mikkelsen, 85.), Dan Djurhuus (Mikael í Lágabø, 70.).

Í Kekkia var Marner Richardt á liðnum, meðan Hans Pauli Dahl ikki var við. Birgir Jørgensen kom inn har niðri í 68. minutti.

Vit síggja, at fleiri spælarar, sum vóru við í 1998, als ikki vóru við í fjør og í ár.

Millum spælararnar, sum eru komnir afturat síðani tá, er Palli Augustinussen. Í 1998 sat hann báðar Intertoto Cup dystirnar á tamb á beinkinum. Tá VB í fjør var betri enn øll hini liðini, var ungi maðurin fastur maður á liðnum, og tað hevur hann eisini verið í ár.

### Marginalirnir

Tá Palli Augustinussen sammetir liðið og gongdina í FM árinum í fjør við gongdina í ár og við liðið, sum í kvøld fer at spæla í Europa Cup, so ásannar hann, at marginalirnir í ár ikki á sama hátt sum í fjør hava verið í parti við hansara liði:

– Vit venja eins nógv, og vit royna at leggja tað sama í, men tað hevur ikki hilnast so væl. Av teimum t í g g j u landskappingardystunum, sum eru spældir higartil, hava vit tapt fimm við einum máli – tríggjar ferðir 2–1 og tvær ferðir 3–2. Tað hevur kenst harmuligt, og serliga meint hevur tað verið, at vit í fleiri førum hava fingið avgerandi mál ímóti okkum í síðstu løtuni, heldur Palli Augustinussen.

Hví hevur gongdin verið so nógv øðrvísi, enn hon var í fjør?

– Tað er rætt, at hon hevur verið øðrvísi, tí í fjør vunnu vit ofta í síðstu løtu. Tað er torførari at spæla, tí hini liðini eru uppsett at spæla ímóti meistarunum, og so er tað ivaleyst so, at sjálvt um vit hava havt viljan at vinna, so hava vit ikki verið so grammir, sum vit vóru í fjør.

Hvussu verður í Europa Cup?

– Tað verður torført. Vit kenna millum lítið og einki til teir, men eg ivist onga løtu í, at allir eru sera uppsettir upp á, at okkara partur ikki skal liggja eftir. Vit vóna eisini, at vit fara at kenna á undirtøkuni, at vit eru á heimavølli. Vit rokna við, at nógvir vágbingar fara at koma norður til Havnar, og vit vita, at nógvir vágbingar í høvuðsstaðnum fara at taka undir við okkum.

### Lyklaspælarar skaddir

Sum vit søgdu í blaðnum leygardagin, so er tað greitt, at Popczynski er so mikið skaddur, at hann ikki verður førur fyri at spæla í Europa Cup.

Í fjør var Predrag Zivkovic stórstuðul í VB verjuni. Tær seinastu vikurnar hevur einki verið at sæð til hansara. Í landskappingardystinum á jóansøku, tá EB/Streymur var í Vági, varð Zivkovic so mikið skaddur í økslini, at hann ikki fekk vant. Men nú hevur hann vant aftur, og tað er sannlíkt, at hann verður við í kvøld.

Ivaleyst fer VB liðið at síggja soleiðis út: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Jón Gærdbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Tórður Holm, Marek Wierzbicki, Jón Pauli Olsen – Birgir Jørgensen, Robert Cieslewic.

**jh**

# Nógvir jugoslavar og russarar

**Hvítarussland hevur ikki gjørt serliga nógv um seg í Europa Cup, men landsliðið hjá teimum hevur seinastu tíðina staðið seg væl**

Gestirnir hjá VB hava ikki gjørt nógv um seg í europeiskum høpi. Hvítarussiska landskappingin er bara tíggju ára gomul. Tað kemst av, at tað er so stutt síðani, at Sovjettsamveldið datt sundur. Slavia Mozyr hevur verið við í fremstu røð øll árini.

Grundarlagið er ein býur við 110 túsund íbúgvum. Hann liggur suður ímóti markinum til Ukreina, og tað er ikki so ógvuliga langt til Tjernobyl, sum liggur ukreinsku megin markið og ikki so langt frá Hvítarusslandi.

Tvær ferðir hevur tað eydnast Slavia Mozyr at vinna meistaraskapin. Báðu ferðirnar tóku teir rívan til, tí bæði í 1996 og í 2000 vunnu teir meistaraskapin og steypakappingina. Kappingarárið í Hvítarusslandi er sum tað í Føroyum – tað vil siga álmanakkaárið.

### Altjóða íslettið

Síðani 1996 hevur Slavia Mozyr luttikið í europeisku kappingunum á hvørjum ári, men tað hevur ikki hilnast so væl hjá teimum. Besta úrslitið fingu teir, tá tað eydnaðist teimum at senda Dinamo Tblisi úr Georgia úr kappingini. Hetta er eitt kent felag, sum rakk sítt besta úrslit í 1981, tá teir vunnu Europa Cup fyri steypavinnarar.

Í fjør spældi Slavia Mozyr í fyrsta umfarinum ímóti Maccabi Haifa úr Ísrael. Hetta felagið sendi í síni tíð KÍ burturúr europeisku kappingini. Tað eydnaðist Slavia Mozyr at sleppa undan tapi í báðum dystunum, men kortini vóru teir ov stuttir. Í Ísrael var málleyst, og í Hvítarusslandi var úrslitið 1–1, og harvið slapp Maccabi Haifa at halda fram í kappingini, tí teir høvdu skorað fleiri mál á útivølli.

Á liðnum hjá Slavia Mozyr eru ikki færri enn níggju útlendingar. Tríggir eru úr Russlandi, m.a. liðformaðurin Oleg Samatov, sum í síni tíð hevur spælt bæði við Lokomotiv og Dinamo Moskva. Seks spælarar eru úr Jugoslavia, og venjarin, sum eitur Vladimir Petrovic, er eisini jugoslavi. Ivaleyst hevur hann spælt fótbólt, men vit duga ikki at siga, hvar hann hevur spælt.

Tveir av hvítarussisku spælarunum eru landsliðsspælarar. Talan er um tveir álopsspælarar. Annar er Valeri Stripeikis, og hin er Roman Vasiliuk. Hesin seinni verður roknaður sum stjørnuspælari á landsliðnum, sum hevur staðið seg væl ta seinastu tíðina. Teir hava framvegis møguleika at sleppa upp í part í HM endaspælinum komandi summar. Hvítarussland er næstfremst í sínum bólki. Teir eru aftanfyri Pólland, men teir eru frammanfyri Wales, Armenia og Noreg. Á útivølli ímóti Noregi var úrslitið 1–1, og á heimavøllinum í Minsk vann Hvítarussland 2–1. Tað var omanfyri nevndi Roman Vasiliuk, sum var meistari fyri sigursmálinum.

Í løtuni er Slavia Mozyr á fimta plássi í landskappingini. Teir hava 20 stig fyri 12 dystir. Síðsta vikuskifti vunnu teir 4–2, eftir at teir í steðginum høvdu verið frammanfyri 4–0.

**jh**